


*Gunnar í Liða var í rættiligum føðingardagshýri, tá hann handaði Helenu Dam á Neystabø – sum vikarieraði fyri Axel V. Johannesen – ein kekk á tíggju milliónir krónur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sjúklingar ikki sendir av landinum longur

**GÁVA Í sambandi við 70 ára føðingardagin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, handaði forstjórin, Gunnar í Liða, Helenu Dam á Neystabø ein kekk upp á tíggju milliónir krónur til keyp av nýggjum MR skannara**

Leo Poulsen

1. juli 1940 byrjaði Tryggingarsamband Føroya sítt virksemi, so í gjár kundi umskipaða Tryggingargelagið Føryar hátíðarhalda sín 70 ára føðingardag. Og tað var gjørt við manér.

– Tað var alla tíðina meiningin, at vit skuldu veita heilsuverkinum eina gávu, og tí settu vit okkum í samband við Landssjúkrahúsið fyri at vita, hvør størsti tørvurin var. Og tað skuldi eisini verða eitthvørt, ið pkáss ikki var fyri innan verandi fíggjarkarmar, sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

Og innan heilsuverkið var eingin ivi. Tað, sum allarstørsti tørvur var á, er ein nýggjur MR skannari.

Hetta var gamaní ein rættiliga dýr gáva, men vit valdu kortini at ganga ynskinum á møti og veita heilsuverkinum eina gávu á tíggju milliónir krónur, sigur Gunnar í Liða.

Føðingardagurin verður annars hildin við einari røð av mentanarligum og trygdarligum tiltøkum komandi tríggjar mánaðirnar.

Gunnar í Liða segði eisini í røðu síni, at Tryggingarfelagið Føryar og heilsuverkið als ikki vóru ólík í sínum starvi, tí bæði seta trygdina í hásæti, um enn ikki júst á somu økjum.

Føðingardagurin í gjár var annars hildin við kaffi og køkum til starvsfólk og sjúklingar á teimum trimum sjúkrahúsunum, umframt at allar deildir hjá felagnum bjóðaðu viðskiftafólkunum kaffi, køkur og eitt tryggingarprát.

### Øktur kapasitetur

Á Landssjúkrahúsinum fegnast tey um hesa stórfingnu gávuna. Við verandi skannara fáa tey gjørt áleið 500 skanningar um árið, meðan nýggi MR skannarin megnar heilar 2000 skanningar.

Men tað er ikki bert talið av skanningum, sum økist. Eisini økir á kroppinum, sum gamli skannarin ikki klárar at skanna, megnar hesin nýggi.

– Eitt annað, sum hesin nýggi skannarin fer at bøta um, er at nú kunnu vit gera so at siga allar skanningar í Føroyum. Tað merkir so, at vit nú fara at sleppa undan at senda fólk av landinum til diagnisiseringar, sigur Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri.

MR-skannarin kemur serliga nøkrum ávísum sjúklingabólkum til góðar. Eitt nú krabbameinssjúklingum, hjarta- og æðrasjúklingum og teimum við sjúkum í rørslulagnum, gallræsunum og nervalagnum.

Hetta er triði skannarin, ið Tryggingarfelagið Føroyar letur heilsuverkinum. Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyum vísir á, at endamálið hjá felagnum er at skapa tryggleika. Hann fegnast um, at felagið við at lata skannarar kann vera við til at skapa tryggleika í heilsuverkinum, og harvið skapa størri tryggleika fyri allar føroyingar. Forstjórin fegnast eisini um, at felagið er so mikið væl fyri fíggjarliga, at tað ber til at geva slíkar gávur, ið kunnu vera øllum føroyingum at gagni.

### Umbyggjast

Skannarin er ikki nakað, ein tekur undir armin. Hann er bæði tungur og krevur nógv pláss.

– Skannarin vigar heili tíggju tons. Men hann krevur eisini pláss, og í løtuni er einki pláss fyri honum. Tað verður tí talan um nakrar umbyggingar, ið skulu til, og hesar mugu gerast samstundis, sum sjúkrahúsið skal fungera. Tað merkir so, at vit neyvan kunnu taka skannaran í brúk fyrr enn út móti sumri komandi ár, sigur Allan Skaalum.

Nýggi skannarin verður tøknifrøðiliga á nýmótans støði, og ger tað møguligt hjá serlæknum uttanlands at móttaka myndir í høgari góðsku umvegis internetið. Marius Rasmussen, leiðandi yvirlækni á Diagnostiska deplinum metir, at við hesi loysn fara heilsuverkið og samfelagið við tíðini at spara munandi pening - og vónandi eisini fleiri mannalív.

leo@sosialurin.fo